INNLENDISMÁLARÁÐIÐ

LANDSVERK
byggir land

22 JUNI 2012

Mál nr. 12/00474-1

Landsverk
Postrúm 78
Tinghúsvegur 5
110 Tórshavn

20. juni 2012
Mál: 11/00292-4
Tygara skriv: 20. februar 2012
Málsviðgerð: AE

**Avrikssáttmáli**

Sjá hjásendan undirskrivaðar avrikssáttmála millum Innlendismálaráðið og Landsverk fyri 2012.
**+Skjal**

Virðingarfyllst

Atli Eiriksson
fíggjarráðgevi

Postboks 159 · 110 Tórshavn · Tlf 306800 · faks 306885 · imr@imr.fo · www.imr.fo

J. nr. 201000656- 2 EK
(at tilskila í svari)

Tórshavn, 20. februar 2012

# Avrikssáttmála
# millum
# Innlendismálaráðið og Landsverk
# 2012

## 1. Inngangur

Hesin avrikssáttmálin er gjørdur millum Innlendismálaráðið og Landsverk. Grundarlagið undir sáttmálanum er, at galdandi lóggáva, reglugerðir, játtanarkarmar og lønarsáttmálar v.m. skulu fylgjast.

Innlendismálaráðið kann ógilda ella broyta sáttmálan ella partar av honum grundað á vanliga yvir- og undirskipan av ráði og stovni, men miðað verður eftir, at møguligar broytingar verða gjørdar í samráð millum ráð og stovn.

## 2. Grundarlag

Grundarlagið undir avrikssáttmálanum er:

- Reglugerð fyri Landsverkfrøðingin frá 22. apríl 1998
- Løgtingslóg nr. 51 frá 25. juli 1972 um landsvegir, sum seinast varð broytt við løgtingslóg nr. 18 frá 8. mai 2008
- Kunngerð nr. 13 frá 26. februar 2007 um landsvegaskrá
- Løgtingslóg nr. 11 frá 31. mars 2004 um at verja havnir
- Kunngerð nr. 33 frá 25. mai 2004 um at verja havnir
- § 22, stk. 3 og § 24, stk. 2 í løgtingslóg nr. 59 frá 17. mai 2005 um verju av havumhvørvinum
- Heimilingarskriv til Landsverk viðvíkjandi basing av oljudálking á sjónum eftir kap. 14 í lóg um verju av havumhvørvinum.
- Kunngerð nr. 22 frá 14. mars 2007 um roknskaparverk landsins
- Løgtingslóg nr. 132 frá 10. juni 1993 um almenna fyrisiting
- Løgtingslóg nr. 133 frá 10. juni 1993 um innlit í fyrisitingina
- Løgtingsfíggjarlógin §15
    a. Umvæling av almennum bygningum
    b. Oljudálking á sjónum



Landsverk
Tinghúsvegur 5
Postsmoga 78
FO-110 Tórshavn

Tel 340 800
Faks 340 801
T-postur lv@lv.fo
www.landsverk.fo

c. Vegir og havnir
d. Samferðsla

## 3. Missión

Landsverk skapar, umsitur og mennir samferðslukervið og aðrar fysiskar karmar.

Virðisorðini handan missiónina

Skapa
Umsita
Samferðslukervið
Fysiskir karmar
Menna

## 4. Visjón

Landsverk skal arbeiða optimalt og veita eina tænastu, ið vissar okkum eitt gott og trygt samfelag.

Virðisorðini handan visjónina

Dygd
Trygd
Tænasta
Fólkið
Optimalt

## 5. Virkisøki stovnsins

Landsverk er tøkniligur stovnur undir Innlendismálaráðnum og tekur sær av:

- At reka og umsita samferslukervið á landi og gera framtíðarætlanir fyri samferðslukervið.
- At kanna og gera ætlanir um framtíðar samferðslukervið
- At hava eina tilbúgving í sambandi við oljudáking á sjónum
- At kanna og gera ætlanir um flogvallaviðurskifti í Føroyum
- At framleiða skerv og asfalt til egið brúk og til privata nýtslu. Umframt at reka og viðlíkahalda rakstrargøgnini hjá Landsverki.
- At halda samferðsluhavnir, sum eru ogn hjá landinum.
- At ISPS- góðkenna havnir
- At umsita leigumál fyri almennar leigusáttmálar.
- At hava byggi- og bygningaumsiting landsins um hendi. Umframt at standa fyri allari nýbygging av almennum bygningum og vegum hjá landinum.
- Ymsum øðrum tøkniligum málum fyri land og kommunur

## 6. Mál og avrik

### 1. Stjórnardeildin

Avgerandi er, at stovnurin hevur eitt høgt fyrisitingarligt støði. Landsverk hevur, sum ein tekniskur vitanarstovnur, tørv á starvsfólkum við førleikum á høgum støði við neyðugum útbúgvingum og royndum. Stjórnardeildin er stápsfunktión og tekur sær av økjum, sum eru felags fyri stovnin innan fyrisiting, starvsfólkmál, fíggjarstýring, kunning og ráðgeving annars.

Deildin hevur í 2012 sett sær hesi mál:

1. Ein vælvirkandi journalskipan er kjarnin í eini hvørjari fyrisiting. Verandi journalskipan verður ikki dagførd longur, og tí er neyðugt, at Landsverk tekur eina nýggja skipan í brúk. Leiðslan hevur tí avgjørt at implementerað journalskipanina 360 í hesum árinum.

2. Sum liður í yvirkskipaðu váðastýringini á stovninum verður arbeitt við eini skipan, ið skal økja tryggleikan og minka um váðarnar ísv., stýringina av verkætlanum. Endamálið við skipanini SEYF er at geva verkætlanarleiðarum, leiðarum og eftirliti eitt samlað, fullfíggjað støðuyvirlit yvir verkætlanirnar. Skipanin hevur innbygdar mannagongdir og kekklistar, ið skulu tryggja eina trygga og eins verkætlanarstýring. Skipanin verður sett í verk í 2012

3. Landsverk er ein stórur stovnur, sum fevnir um alt landið. Tí er tað av alstórum týdningi, at kunningin millum starvsfólkini er á einum so góðum støði sum gjørligt. Tí verður arbeitt við at fáa gjørt kravfestingin til nýtt intranet í 2012 soleiðis at støða kann takast til keyp og væl av skipan.

4. Landsverk er ein av teimum stóru stovnunum í Føroyum, og er tað tí av alstórum týdningi, at fíggjarliga umsitingin er á ein høgum fakligum støði. Leiðslan hevur tí gjørt av at fáa eina óhefta gjøgnumgongd av øllum fíggjarligum mannagongdum. Landsverk hevur í hesum sambandi heitt á eitt grannskoðaravirki um at gjøgnumganga allar mannagongdir á fíggjarliga økinum.

5. Trivnaður og eitt gott arbeiðsumhvørvi eru avgerandi fyri avrikini hjá starvsfólkunum. Tí er ætlanin at gera eina innanhýsis trivnaðarkanning seinni í heyst 2012.

### 2. Byggideildin

Landsverk hevur bygging og umvæling av bygningum landsins um hendi. Landsverk hevur tí mótvegis samfelagnum og brúkarum ábyrgdina av allari tilgongdini í sambandi við bygging/umvæling. Tað er av stórum týdningi, at Landsverk finnur optimalar loysnir innan fyri givnar karmar við atliti at funktionaliteti, góðsku, byggilist, umhvørvi og kostnaði.

Deildin hevur í 2012 sett sær hesi mál:

1. Kannaður verður møguleiki at fáa eina prosjektstýringsskipan soleiðis at øll, sum hava prosjekt um hendi, arbeiða eftir sama leisti.

2. Samstarvið við aðalráðini verður styrkt og skipað á tann hátt, at sáttmáli veður gjørdur við aðalráðini, har ásett er, hvønn leiklut, hvør hevur.

3. Heilsa, trygd og umhvørvi fáa hægri raðfesting enn higartil, og síggjast skal til, at sett krøv hesum viðvíkjandi verða hildin.

4. Neyðug stig verða tikin til, at góðskutrygging arbeiðstakarans verður framd.

5. Samstarvið við fakeftirlitið verður skipað soleiðis, at krøv og rapportering verða lýst betur.

6. Fyri at fáa eitt skipað viðlíkahald av almennum bygningum er tørvur á at hava eitt fullfíggjað yvirlit yvir allar almennar bygningar, viðlíkahaldstørv, hølistørv, fermetrartal og hvat hesir fermetrar kunnu brúkast til. Kannaður verður møguleikin at fáa eina skipan, ið kann nøkta tørvin á hesum øki.

7. Ætlanin er at orða ein arkitekturpolitikk.

## 3. Infrakervið

Deildin fyri Infrakervi tekur sær av landsvegakervinum, lands- og samferðsluhavnum, tyrlupallum flogvallamálum og oljubasing á sjónum. Tað hevur týdning, at raksturin av hesum er so effektivur, sum til ber, og at tað verður støðugt arbeitt við at gera tað tryggari at ferðast bæði á havnum, tyrlupallum og á landsvegakervinum. Umframt hetta er tað av alstórum týdningi, at havumhvørvið verður vart ímóti dálking.

Deildin hevur í 2012 sett sær hesi mál:

1. At implementera nýggja landsvegalóg og landsvegaskrá saman við IMR.

2. Gjørd verður ein ætlan fyri orkusparing í sambandi við virksemið

3. Fartelefon verður sett upp í smærru tunlunum, har tað letur seg gera, og í samráði við telefonveitarar. Royndir verða gjørdar við alternativari útvarpssendiútgerð og skaðastaðsradio í tunlunum.

4. Innsavning av ferðsluhagtølum verður automatiserað víðari.

5. Ferðslumerkingarkunngerð og vegleiðingar verða gjørdar. Uppskot til ferðslumerkingarkunngerð er latin IMR. Vegleiðingar til skelting mangla. Í ár er málið at gera: Vegleiðing fyri uppsetan av valplakatum og vegleiðing fyri reklamuskelting.

6. Samferðsluætlan 2012-2024 skal vera liðug 1. apríl 2012. Í hesum sambandi verður eisini gjørd viðkvæmiskanning av infrakervinum.

7. Hildið verður áfram at gera tilbúgvingarætlanir fyri smærru tunlarnar. Talan er um at gera eina tilbúgvingarætlan fyri Kunoyartunnilin.

8. Gjørd verður ein støðumeting av havnum og ein viðlíkahaldsskipan fyri viðlíkahaldið. Í hesum sambandi skal greiða fáast á, hvørjar skyldur Landsverk hevur mótvegis kommunalum havnum, og um tær skula leggjast í skipanina.

9. Alternativar tilbúgvingarhavnir/rampur verða staðfestar.

10. Bygnaður fyri stýring av oljubasingarátøkum er gjørdur. Operativu átøkini verða framd við støði í útgerð, ið longu er í landinum. Arbeiðið at gera lidna tilbúgvingarætlanina verður liðugt í juni 2012. Gjørd verður ætlan fyri og skjøtul settur á at útbúgva viðkomandi starvsfólk á LV og uttanfyri til at luttaka í oljubasing á sjónum.

11. Tyrlupallurin í Koltri er í dag ikki góðkendur av Statens Luftfartsvæsen. Í sambandi við ætlanina at gera ein tjóðargarð í Koltri má forprosjekt til nýggjan tyrlupall endurskoðast. Ein ætlan fyri hetta verður liðug 1. september 2012.

12. Tyrlupallurin í Stóru Dímun er einasti tyrlupallur í Føroyum, sum ikki hevur ljós. Hetta merkir, at tað ikki ber til at flúgva í myrkri. Forprosjekt og kostnaðarmeting av ljósanleggi á tyrlupallinum í Stóru Dímun verður liðugt 1. juni 2012.

13. Landsverk hevur seinastu árini arbeitt við at kanna og gera tilmæli um, hvar ein framtíðar flogvøllur skal byggjast. Veður- og staðfrøðiligar kanningar eru gjørdar, sum geva ábendingar um hóskandi stað. Fyri at koma til eina endaliga niðurstøðu um, hvar ein nýggjur vøllur kann gerast, eru gjørdar numeriskar vindsimuleringar, og er hetta arbeiðið liðugt. Niðurstøða og tilmæli verða gjørd í seinasta lagi 1. juni 2012.

## 4. Framleiðsludeildin

Framleiðsluøkið umfatar framleiðslu av skervi, gróti, asfalti og entreprenørarbeiðir annars. Umframt hetta hevur deildin um hendi umvælingar av maskinum og amboðum hjá Landsverki. Deildin ætlar í 2012 at geva Framleiðsludeildini ein grønan profil. Tí setir deildin sær fyri hesum málum í 2012.

Deildin hevur í 2012 sett sær hesi mál:

1. Umhvørvisgóðkenning av øllum virkseminum í Hundsarabotni skal fást til vega í 2012.

Landsverk
Tinghúsvegur 5
Postsmoga 78
FO-110 Tórshavn

Tel 340 800
Faks 340 801
T-postur lv@lv.fo
www.landsverk.fo

2. Arbeitt verður við at fáa skervin úr Hundsarabotni og Suðuroy sertifiseraðan. Hetta til tess, at hann kann verða nýttur á teimum góðkendu føroysku betongblandistøðunum.

3. Landsverk fer at fyrireika eina tænastu, har tað ber til at endurvinna betong. Útgerðin er fingin til vega, og arbeitt verður við at kunna hetta út til møguligar áhugabólkar.

4. Til tess at spara um oljunýtsluna á Landsverki verður, sum ein roynd, umlagt til biobrenni á Maskinstøðini í Kollafirði.

## 7. Avtalutíðarskeið og uppfylging

Sáttmálin er fyri árið 2012. Statusfundur verður í september 2012. Harumframt ger Landsverk stutta statusfrágreiðing í seinnu helvt av juni 2012.

Í november 2012 verður eitt uppskot til avrikssáttmála fyri 2013 sent Innlendismálaráðnum.

| | |
|---|---|
| Ewald Kjølbro, stjóri<br>Landsverk | Rúni Joensen, aðalstjóri<br>Innlendismálaráðið |